## Cannavaro nærkast metinum

Fyri italska liðformannin, Fabio Cannavaro, var dysturin í Modena enn ein marknasteinur á glæsiligu fótbóltsleið hansara. Dysturin móti Føroyum var nevnliga nummar 113 hjá honum fyri italska landsliðið, og tað er tað næstmesta, sum nakar hevur spælt. Dino Zoff, sum var málverji og liðformaður í HM-kappingina í 1982 hevur 112 dystir á all-time listanum, men enn er so nakað upp til Paolo Maldini, sum spældi 126 landsdystir.



## Sýndu vinarlag

Eftir syrgiligu hendingina í italskum fótbólti fyri eini viku síðani, var av álvara lagt upp til at skapa ein positivan og góðan stemning kring vøllin í Modena. Og illa ber til at siga annað, enn at hetta eydnaðist. Gjøgnum dystin var talan at kalla einvíst um positiv róp frá áskoðarunum, sum ongan tíð smæddust burtur fyri at rósa føroyingunum eisini. Innsavnan var eisini eisini partur av dystinum, og teir 19.000 áskoðararnir góvu tilsamans 203.000 evrur til vælgerandi endamál.



*Rógvi fer upp at skalla, og tá bólturin løtu seinni leggur seg til rættis í italska málinum er málmetið veruleiki. Og tað verður sjálvandi markerað við 10 fingrum til áskoðararnar*

# Fleiri ferðir burturi enn heima

**Rógvi hevur skorað seks landsliðsmál á útivølli, og nýggi toppskjúttin hevur skorað tíggju mál í 48 dystum, meðan tann gamli skoraði níggju mál í 45 dystum**

MÁLINI
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Rógvi Jacobsen umboðaði føðilandið fyri 48. ferð, tá ið hann skoraði fyri tíggjundu ferð og harvið legði seg ovast á føroyska máltindin. Gamla metið átti Todi Jónsson. Hann umboðaði Føroyar 45 ferðir, og í hesum dystunum skoraði hann níggju mál.

Seks av teimum tíggju málunum hevur Rógvi Jacobsen skorað á útivølli, og fýra ferðir hevur hann verið á heimavølli, tá ið hann hevur verið fagnaður sum málskjútti fyri Føroyar.

Tað tók sína tíð hjá Rógva Jacobsen, áðrenn hann fyrstu ferð fekk bóltin í mótstøðumálið. Tá ið Føroyar sunnudagin 10. februar 2002 spældu venjingardyst í Limasol á Kypros ímóti Póllandi, var Rógvi Jacobsen fyri 14. ferð á landsliðnum. Í 27. minutti javnaði hann til 1-1. Pólland vann 2-1.

Næsta málið skoraði Rógvi í EM undankappingardystinum á Laugardalsvøllinum í Reykjavík 7. juni 2003. Ísland vann 2-1, og Rógvi Jacobsen javnaði til 1-1 í 63. minutti.

Tá ið Ísland í somu kapping vitjaði á Tórsvølli 20. august í 2003, varð úrslitið aftur 2-1 til Ísland. Aftur hesa ferðina javnaði Rógvi Jacobsen til 1-1. Tað gjørdi hann í 66. minutti.

18. august í 2004 vitjaði Malta á Svangaskarði. Úrslitið í vinardystinum var 3-2 til Føroyar. Rógvi Jacobsen økti um leiðsluna til 2-0 í 42. minutti.

11. oktober í 2004 endaði HM undankappingardystur á Kypros 2-2. Rógvi Jacobsen legði í 42. minutti Føroyar framum 2-1.

4. juni í 2005 spældu Føroyar og Sveis HM undankappingardyst á Svangaskarði. Sveis vann 3-1, og fyri sættu ferð var Rógvi Jacobsen føroyskur málskjútti. Í 70. minutti javnaði hann til 1-1. Tann støðan helt sær í tríggjar minuttir, so legði Sveis seg aftur á odda, og undan leikloki staðfestu teir sigurin.

Fýra tey síðstu málini á veg ímóti tindinum hevur Rógvi Jacobsen skorað í EM undankappingini, sum nú er lokin. Føroyar hava skorað fýra mál, og Rógvi hevur hvørja ferð verið skarprættari.

Fyrsta málið skoraði hann, tá ið Føroyar í Georgia 28. mars taptu 3-1. Í 55. minutti minkaði Rógvi um munin til 2-1.

Annað málið í EM undankappingini skoraði Rógvi í heimadystinum ímóti Italia tann 2. juni í ár. Italia vann 2-1, og Rógvi Jacobsen minkaði um munin til 2-1, tá ið tað restaðu trettan minuttir.

12. september er minnisríkur føroyskur fótbóltsdagur. Henda dagin í heyst var landsliðið í Litava, har úrslitið gjørdist 2-1 heimasigur. Rógvi Jacobsen minkaði um munin í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat.

Við níggju málum hevði Rógvi Jacobsen lagt seg upp á síðuna av Toda Jónssson, og síðani hevur tað bara verið ein spurningur um tíð, nær metmálið fór at gerast veruleiki. Tað gjørdi tað sjey minuttir undan leikloki mikukvøldið 21. november, tá ið Føroyar taptu 3-1 ímóti italskuheimsmeistarunum í Modena í Italia.



*Føroyski venjarin var serstakliga væl nøgdur um tað, sum blaðungu bakkarnir hjá føroyska landsliðnum vístu*

# Ivaðist til tað seinasta

**Jógvan Martin Olsen segði eftir dystin mikukvøldið, at hann fram til tað seinasta ivaðist, hvussu føroyska liðið skuldi stillast**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*
*jakup@sosialurin.fo*

**Modena, Italia:** Hóast tesan um heiðurligu tapini ikki longur er so væl lýdd í føroyskum fótbólti, so var føroyski landsliðsvenjarin á ongan hátt vónbrótin, eftir at hansara menn høvdu strítt seg til eitt tap av júst tí slagnum mikukvøldið.

- Sum heild haldi eg, at eg var sera væl nøgdur um avrikið. Ikki minst tí eg ikki var heilt avkláraður um, hvussu eg skuldi stilla liðið. Eg ivaðist sera nógv í ávísum plássum, og tók kanska onkra avgerð, sum eg als ikki var so vísur í var tann rætta. Men nú eftir dystin má eg siga, at eg eri fegin um hesar avgerðir, har eg kanska ikki tók vanliga atlitið til dagsformin hjá onkrum spælara.

- Men tað stuttligasta haldi eg var at síggja, hvussu væl bakkarnir hjá okkum spældu. Hetta er jú ein fantastisk kulissa at spæla í, og tað er ógvuliga týðandi fyri teir, at teir fáa slíkar royndir. Og teir spældu eisini útmerkað haldi eg.

*Men sum heild tóktist føroyska liðið eisini at tora at spæla?*

- Ja, avgjørt. Teir fáa kanska tvey keðilig mál, har vit eru óhepnir at gera sjálvmál, og har teir so skora triðja málið eftir eitt óneyðugt bólttap. Sjálvt um hatta skotið nú var ótrúliga gott.

Í hálvleikinum avtalaðu vit so, at vit skuldu spæla, sum høvdu vit framvegis nullið, og tað haldi eg eydnaðist væl. Sjálvandi kanst tú so altíð tosa um, at Italia tók fótin av speedaranum. Men eg haldi samstundis, at okkara tordu at spæla, og tað var ógvuliga gott at síggja. Serliga haldi eg tað hjálpti, at vit tóku málverjan við í spælið eftir steðgin, tí undan hesum hevði tað als ikki eydnast okkum at taka ferðina av dystinum.

- Og so sóu vit fleiri av okkara spælarum, sum veruliga lyfti sítt støði. Christian Holst var ein fragd fyri eygað, og bæði Súni, Atli, Jón Rói og Fróði vóru framúr. Eg haldi ikki, at eg kann seta fingurin á nakran í so máta.